Kunoyar
kommuna

# KUNOYAR KOMMUNA
# BYGGISAMTYKT 2018-2023

## fyri bygdirnar
## Kunoy og Haraldsund







Okt./18

**KUNOYAR KOMMUNA**

Byggisamtykt 2018 -2023

INNIHALD: síða


| | | |
|---|---|---|
| Byggisamtykt fyri Kunoyar kommunu | | 3 |
| Økið samtyktin fevnir um | | 3 |
| Umsitingarligar fyriskipanir | | 4 |
| Óbygdu økini | | 4 |
| ÁSETINGARNAR FYRI TEY EINSTØKU ØKINI: | | |
| A. | Miðstaðarendamál | 4 |
| B. | Sethús | 5 |
| C. | Vinnuendamál | 6 |
| D. | Havnarøki | 6 |
| E. | Almennir stovnar | 7 |
| F | Almenn Frítíðarøki | 7 |
| H. | Frílendi | 7 |
| I. | Summarhúsøki | 8 |
| K. | Aliøki | 8 |
| L. | Landbúnaður | 9 |
| Útstykkingar | | 9 |
| Vegir | | 9 |
| Byggingarfyriskipandi ásetingar | | 10 |
| Útrokning av byggistigi | | 10 |
| Broytingar í byggisamtyktini | | 10 |
| Kunoyar Kommuna | | 11 |
| Kunoyar bygd | | 12 |
| Haraldsunds bygd | | 12 |

# BYGGISAMTYKT FYRI KUNOYAR KOMMUNU

Sambært løgtingslóg nr. 13, frá 21. mai 1954, um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verða hesar ásetingar at galda fyri Kunoyar og Haraldsunds bygd.
Kortskjal 1 yvir Kunoyar bygd. Mát 1:2000
Kortskjal 2 yvir Haraldsunds bygd. Mát 1:2000

## 1.gr. Økið, samtyktin fevnir um

1. Byggisamtyktin fevnir um báðar bygdinar Kunoy og Haralsund

2. Kommunan verður sundurbýtt soleiðis eftir nýtsluni av økjunum:

   A. Miðstaðarendamál, bert í Kunoy

   B. Sethús

   C. Vinnuendamál

   D Havnarøki

   E. Almennir stovnar

   F. Almenn frítíðarøki

   H. Frílendi

   I. Summarhúsøki

   K. Aliøki

   L. Landbúnaður

3. Økini eru innstrikað á hjáløgdu kortum i máti 1:2.000 og frámerkt við avvarðandi bókstavi.
   Økispartarnir til landbúnað hava tó ongan bókstav. Tó er sunnanfyri Haraldsund avmerkt eitt øki L1 til seyðahald í L-økinum (landbúnarøkinum).

Umsitingarligar fyriskipanir

2. gr. Byggivald, byggiumsókn og byggiloyvi

1. Byggivaldið í kommununi útinnir bygdarráðið.
2. Byggiumsókn skal sendast Kunoyar Kommunu talgild ella sum vanlig papíravrit og vera smb. BR17 §1.3
3. Farið kann ikki verða undir arbeiði uttan skrivligt loyvi fra bygdarráðnum sum verður útskriva smb. BR17 §1.4
4. Byggiloyvið hevur gildið í eitt ár, og kann leingjast 1 ár áðrenn freistin er úti.
5. Er byggiloyvið farið úr gildið ella eldri enn 2 ár skal søkjast av nýggjum.
6. Byggivaldið eigur at fáa boð um nær arbeiðið byrjar, og hvør ið stendur fyri tí.

**Óbygdu økini**

3 gr. Tilhaldspláss og bilstøðlar

1. Trygd skal veitast fyri, at nóg stórt uttandura tilhaldspláss er til tey, ið búgva og/ella arbeiða í húsinum.
2. Nóg stort øki skal verða lagt av til bilstøðlar, soleiðis at íbúgvarnir og/ella tey, sum starvast í húsinum og vitjandi, viðskiftafólk, útvegamenn o.o. fáa sett akfarið frá sær á økinum, ið hoyrir til húsini.
3. Vanliga verður kravt í minsta lagi pláss til 2 bilar til hvønn bústað. Har felags bilstøðlapláss verður gjørt til fleiri bústaðir ella har talan er um hús til vinnulig endamál, skal góðkenning frá byggivaldinum fyriliggja í hvørjum einstøkum føri.

**Ásetingar fyri tey einstøku økini**

4. gr. Ásetingar fyri øki **A: Miðstaðarendamál**

1. Økið verður lagt burtur av til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, samkomuhøli, heilsubótarstovur o.t. Í serstøkum førum er loyvt at innrætta íbúð til virkiseigaran ella starvsfólk.

2. Reguleringsætlan skal gerast fyri økið, sum byggjast skal á, áðrenn bygt verður.

3. Byggistigið má ikki fara upp um 0.5. Hús kunnu í mesta lagi verða bygd í 2 hæddum við nýttum lofti og kjallara og skulu annars ikki vera hægri enn 9,5 m til yvirgrindina og 12,5 m til mønuna, mált frá hæddini ásett í reguleringætlanini. Verður kjallari ikki gjørdur verða frammanfyri ásettu mát minka 2.5 m. Bert ein kjallari má vera.

5. gr. Ásetingar fyri øki **B: Sethús**

1. Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og tvíhús, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski pr. íbúð. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingi. Bústaðarskylda er á húsunum sum verða bygd í hesum økinum, og verður hendan tinglýst á økið saman við skeytinum.

2. Grundstykkini skulu vera i minsta lagi 400 m2 til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdarráðið hevur góðkent og tryggja ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdarráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 400 m2, tó í minsta lagi 320 m2 fyri sethús (einhúskishús) og 260 m2 fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.

3. Reguleringsætlan skal gerast fyri økið sum byggjast skal á, áðrenn bygt verður.

4. Nettonýtingarstigið má ikki fara uppum 0,3 fyri einhúskishús og 0,4 fyri tvíhús, ketu- ella raðhús.

5. Hús mugu einans verða bygd i einari hædd og kjallara við nýttum lofti og mugu ikki vera hægri 5,5 m til yvirgrindina og 10 m til mønuna, mált frá hæddini ásett í reguleringætlanini. Verður kjallari ikki gjørdur verða frammanfyri ásettu mát minka 2.5 m.

6. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtingarstig, ið nevnd eru í stk. 3, tá økið verður roknað sum heild.
7. Loyvt verður at umvæla verandi sethús og byggja afturat teimum, t.d. durur, baðirum o.t., so tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.

6. gr. Ásetingar fyri øki **C: Vinnuendamál**

1. Økið er útvið fult útbygt við neystum, úthúsum, gamla handlinum v.m.
2. Umframt omanfyristandandi verður loyvt at nýta verandi bygningar til sølubúðir, íbúðir v.m. við atliti til ferðavinnu.
3. Íbúðir til fastbúgvandi verður ikki loyvt á økinum.
4. Bygdarráðið kann loyva broyting av verandi bygningum, men atlit skal takast til at økið ikki broytir bygdaliga dámin.

7. gr. Ásetingar fyri øki **D: Havnarøki**

1. Økið verður lagt av til havnaendamál, herundir eisini smábátahavn og neyst, og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu, og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t.
2. Áðrenn bygging kann verða framd skal kommunan góðkenna eina reguleringætlan sum ásetur lendishæddina(nar) fyri økið
3. Byggingarstigið fyri havnarøkið sum heild, má ikki fara upp um 0,3.
4. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 8.
5. Bygging til vinnuendamál má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 10 m og og fjarstøðan millun bygningar ikki verða minni enn 5 m.

8. gr. Ásetingar fyri øki **E: Almennir stovnar**

1. Økið verður lagt av til almennar stovnar, til undirvising, heilsurøkt, mentanarlig og átrunaðarlig endamál o.t.
2. Innan fyri økispartarnar mugu bara verða gjørd slík virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarðandi økispørtum og tænastuvirksemi, ið hava samband við tey.
3. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,3.
4. Hús kunnu bara verða bygd eftir eini byggiætlan, sum bygdarráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað øki.

9. gr. Ásetingar fyri øki **F: Almenn frítíðarøki**

1. Økið verður lagt av til ítróttarvøllir, spælipláss, útiverupláss herundir húsvogna - og tjaldingarpláss, viðarlund o.t.
2. Innan fyri økini mugu bara verða gjørd virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarðandi økispørtum og tí tænastuvirksemi, ið hevur samband við tey.
3. Hús kunnu bara verða bygd eftir byggiætlan, sum bygdarráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað øki.
4. Planting av runnum og trævøkstri kann bert fara fram eftir góðkendari plantingarætlan.

10. gr. Ásetingar fyri øki **H: Frílendi.**

1. Frílendi t.e. bøur og lendi, sum ikki má byggjast á. Tað eru lendi, sum løgd eru av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til at fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í.
2. Á teim í 1. stk. fyrr nevndu økjum mugu bert verða gjørdir vegir, gøtur, bilstøðlar, veitingar, garðar o.t. Á teimum einstøku økjunum kunnu verða reistir bygningar, sum skila til virðið á økinum.
3. Útstykking má ikki fara fram.

11. gr. Ásetingar fyri øki **I: Summarhúsøki.**

1. Øki verður avlagt til bygging av summarhúsum.
   Støddin á grundstykkjunum skal ikki verða minni enn $120m^2$ - og ikki størri enn $160m^2$.

2. Útstykkingar - og reguleringsætlan skal gerast fyri økið, sum verður bygt.

3. Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 3 m til yvirgrindina og 6,5 m til mønuna, mált frá hæddini ásett í reguleringsætlanini.
   Um tað fellur natúrligt á lendinum kann kjallari verða gjørdur.

4. Hús kunnu verða samabygd.

5. Felags bilstøðlasøki skal gerast til økið.
   Atkomuvegur skal verða til øll stykkini. Loyvt verður ikki at seta bil frá sær á atkomuvegnum.

6. Byggistigið má ikki fara upp um 0,5.

12. gr. Ásetingar fyri øki **K: Aliøki.**

1. Økið verður avlagt til tænastuvinnu til alingina.

2. Á økinum kunnu bert instalatiónir verða uppsettar/bygdar, sum hava beinleiðis samband við at tæna alivinnuni.

3. Bryggja kann verða gjørd til alibátar at lossa og lasta; tó ikki til liggjandi bátar.

13. gr. Ásetingar fyri øki **L: Landbúnaður**.

1. Øki L er tað sum er eftir av kommununi, tá ið frammanundan nevndu økini eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, vakstrarhús, grótbrot, fiskaalistøðir o.a.

2. Loyvt er bert at byggja hús, ið neyðug eru til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í l. stk. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband og í sambandi við vegahald.

3 Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst gjørligt.

4. Sunnanfyri bygdina Haraldsund er avsett eitt øki, merkt L1 í L økinum, sum er ætlað sum felagsøki til hagapartarnar í Haraldsundi at hava rætt, seyðahús, flettingarrúm og annað felags virksemi innan seyðahald.
Ætlan skal gerast fyri økið, sum bygdarráðið skal góðkenna, áðrenn byggiloyvi kann verða givið.

14. gr. Útstykkingar

1. Útstykking til tey endamál, sum nevnd eru í greinunum kann bert verða framd eftir útstykkingarætlan, sum bygdarráðið hevur góðkent fyri eitt nátturliga avmarkað størri øki uttan um avvarðandi grundstykki.

15. gr. Vegir

1. Lagdir verða av vegir við leið og legu sum í stórum er tilskilað á hjálagda korti.
2. Bygdarráðið er heimilað at gera av hvussu markið millum grundstykki og veg skal greiðast.

3. Mál um bygging fram við landsvegi skulu viðgerast sambært ásetingum í løgtingslóg 18 frá 8. maj 2008.

**Byggingarfyriskipandi ásetingar**

16. gr. Byggingarfráleikar

1. Ásetingarnar í byggningskunngerðini 2017 (**BK17**) eru galdandi. Landsvegamyndugleikin ásetur fráleikan frá landsvegi.

17. gr. Útrokning av nýtingarstigum.

Ásetingarnar í byggningskunngerðini 2017 (**BK17**) eru galdandi.

18. gr. Broytingar í byggisamtyktini

1. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir bygdaráðssamtykt og við góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

**Soleiðis samtykt av Kunoyar Bygdaráð 31.01.2018.**

**Sóleyð Klettskarð í Kongsstovu borgarstjóri.**

# DAGFØRDA BYGGISAMTYKTIN FYRI KUNOYAR BYGD OG NÝGGA FYRI HARALDSUNDSBYGD.

**Kunoyar Kommuna.**

1. januar 2017 varð nýggj bygningskungerð sett í gildið fyri Føroyar (**BK17**).

Víst verður til frágreiðingina í Byggisamtykt 1995-2010 fyri Kunoyar Bygd.

Henda byggisamtykt er ein dagføring av hesi, og er eisini í hesum sambandi gjørd byggisamtykt fyri hina bygdina í kommununi nevnliga Haraldsund.

Kortskjal er gjørt til báðar bygdirnar.

Niðanfyri er víst yvirlit yvir fólkatalið í bygdunum og harvið eisini í kommununi.

Eisini er yvirlit yvir grundstykkir, sum kommunan hevur tøk í báðum bygdunum.

Umframt hetta eru privat grundstykkir sum liggja óbygd.

Mett verður at grundstykkjatørvur tey næstu fimm árini er nøktaður; annars hevur kommunan møguleika at útstykkja innanfyri verandi sethúsaøkir.

**Fólkatal í Haraldsundi og Kunoy.**

| Ár pr. 01.01 | Haraldsund | Vøkstur í mun til 1985 | Kunoy | Vøkstur í mun til 1985 | Komunan tils. | Vøkstur í mun til 1985 | Kelda |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1985 | 52 | | 49 | | 101 | | Hagstovan |
| 1990 | 67 | 28,8 | 49 | 0,0 | 116 | 14,9 | Hagstovan |
| 1995 | 67 | 28,8 | 60 | 22,4 | 127 | 25,7 | Hagstovan |
| 2000 | 74 | 42,3 | 62 | 26,5 | 136 | 34,7 | Hagstovan |
| 2005 | 74 | 42,3 | 68 | 38,8 | 142 | 40,6 | Hagstovan |
| 2010 | 71 | 36,5 | 81 | 65,3 | 152 | 50,5 | Hagstovan |
| 2015 | 64 | 23,1 | 65 | 32,7 | 129 | 27,7 | Hagstovan |
| 2017 | 69 | 32,7 | 68 | 38,8 | 137 | 35,6 | Hagstovan |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hús (býli) uml. | 24 | | 39 | | 63 | | Kortal |
| Óbygd grund - stykki uml. | 6 | | 17 | | 23 | | Kortal |

**Kunoyar bygd**

Høvðusbroytingarnar í dagføringini av byggisamtyktini fyri Kunoyar bygd er, at økir eru sett av til summarhús og húsvognar, eins og at norðasta sethúsaøki Norðuri í Húsi er tikið burtur, og í staðin er sethúsaøkið Heimi í húsi økt norðureftir. Hetta fyri at samla gomlu býlingarnar heldur enn at spjaða teir.

**Harðaldsunds bygd**

Haraldsund hevur ikki verið umfata av byggisamtyktini fyri Kunoyar Kummunu og verður nú tikin við í økisásetingarnar, so leisturin er tann sami sum fyri Kunoyar bygd.
Ásetaninar byggja í heild á støðuna sum hon er í dag, umframt at tikið er hædd fyri øktum virksemi í framtíðini.
Haraldsunds bygd hevur frá fornari tíð verðið ein býlingur, men um 1900 fluttu fólk av Skarði, eftir skaðatilburirnar har, til Haraldsunds og búsettust Suðuri á bakka og blivu tá tveir býlingar.
Í nýggjari tíð er útstykking Suðuri á Leiti gjørd sunnafyri, niðanfrá býlinginum Suðuri á bakka.
Kai er gjørd í 1940-árunum.
Bátahylur er gjørdur nakað norðanfyri kaiina og grótið er fingið úr einum grótbroti norðanfyri gomlu bygdina.
Økið í grótbrotinum saman við bátahylinum hevur verðið nýtt sum blanda havnaøki; til smábátar og virksemi sum hoyrír til hetta v.m.
Eisini er í seinastuni fóðurstøð og goymslupláss til alivinnuna gjørt í økinum.
Atkoman til havnarøkið er eftir verandi bygdavegi fram við bakkanum, sum ikki kann sigast verða hóskandi til tað tungu ferðslu, sum økið krevur í dag.
Av hesi orsøk er lagt av øki til "tænastur til alivinnuna" norðanfyri byrgingin um Haraldsund, so at tunga ferðslan í minst møguligan mun skal ígjøgnum bygdina.
Annars eru økini kring verandi sethús í bygdini løgd av sum sethúsøki, og víddin er so at nøkur grundstykkir kunnu fáast her.

Bøurin er lagdur av til frílendi soleiðis at hesin verður varveittur í tí líki hann er í í dag. Í hesum øki eru nøkur fornminnir, men mett verður at hesi eru vard við ásetingunum um frílendi.
Skúlin, bygdarhúsið, húsini hjá bygdafelagnum Bríkin, og gamla el-verkið eru løgd inn undir økið almennir stovnar.
Innanfyri landbúnaðarøki (uttangarðs) er avlagt eitt økið til felags virksemi til hagapartarnar sum hoyra til Haraldsund, s.s. rætt, seyðhús, flettingarrúm v.m.